Danmark eru serliga opnir yvir fyri at flyta heim aftur.

Kanningin vísir, at tað er tað ikki. Føroyingar umhugsa javnan møguleikar at flyta hem aftur.

Høvuðsskeringarnar fyri, nær hetta er serliga viðkomandi, er við lokna útbúgving, tá fólk umhugsa at fáa sítt fyrsta barn, tá børnini koma í skúlaldur, tá fólk miðvíst leita eftir nýggjum starvi og tá børnini eru flogin úr reiðrinum.

Inn ímillum hesi skeringspunkt er alla tíðina ein ávísur mettleiki, sum økir áhugan at flyta heim aftur, til dømis tá mentanartilboðini í Danmark missa týdning í mun til valið millum Danmark mótvegis Føroyum.

Ella tá hugurin til at arbeiða nógv og raðfesta eins starv hægst ofta minkar aftaná nøkur ár á arbeiðsmarknaðanum og 1. ættarliðs-føroyingarnir gerast búnir at raðfesta annað virksemi hægri – hetta elvir samstundis til at spurningurin um at flyta aftur til Føroyar verður tikin upp.

## Mentanin

Atfinningin at føroyskari mentan er vælkend, spurningurin er so bara, um føroysk mentan er ein forðan fyri, at føroyingar flyta heim aftur.

Ført verður fram, at kjakhugurin er lítil og eingin, og at hetta tarnar frælsum orðaskifti, men hetta er eisini ein fyrimunur við tað at alt ikki verður viðgjørt út í æsir.

Annað er, at nepotisma er útbreidd, og at tað finnast fyrimunir í at hoyra til ávísan trúarfelagsskap, men hetta er einki øðrvísið enn í Danmark.

Ført verður fram, at minnilutabólkar eru fyri mismuni í Føroyum, men veruleikin er, at hetta í nógv størri mun er útbreitt í Danmark við sonevndu »hate-crimes« hvørt einasta vikuskifti.

Sagt verður, at føroysk mentan er konservativ og hevur lyndi at illkennast inn á modernaða lívsførslu. Slíkur hugburður umboðar tó fastar lívsreglur, meðan tað frælslyndi, sum vísir seg at valda í Danmark, mangan fjalir út yvir størri líkasælu.

Eitt annað, sum ofta verður havt á lofti er, at støðið í politiska arbeiðinum í Føroyum er lágt, men hetta kann eisini síggjast sum dømi um veruligt fólkaræði í mun til embætismannaveldið, sum rekur samfelag uttan at almenningurin hevur nakra munaverda ávirkan.

Og endaliga verður ført fram, at Føroyar eru eitt mannfólkaveldi. Hetta er tó ikki so eintýtt, og er allarhelst eitt fyribrigdi í afturgongd, serliga í Suðurstreymi.

So niðurstøðan hjá Suna Poulsen er, at mentanin ikki er nøkur forðan fyri, at føroyingar flyta heim aftur.

## Marknaðarføra Føroyar

Í niðurstøðu síni sigur Suni Poulsen soleiðis:

Avgerðin hjá 1. ættarliðsføroyingum um at verða verandi í Danmark byggjur gjøgnumgangandi ikki á, at tilveran niðri er *»betur, størri og skjótari...«*

Talan er hinvegin um, at tilveran í Danmark er knýtt til ávís unik, positiv virði, ímeðan ein møgulig tilvera í Føroyum er samanbundin við ein annan sjálvstøðugan flokk av unikum, positivum virðum

Tað snýr seg also ikki um, at Danmark er betri ella verri enn Føroyar – men um tveir ymiskar møguleikar, ið báðir hava ymiskt positivt at bjóða

At marknaðarføra Føroyar yvir fyri føroyingum uttanlands snýr seg also ikki um at fáa oyggjarnar at líkjast útlandinum – men hinvegin um at minna um positivu eyðkennini, ið longu eru rótfest í føroysku mentanini

Almenn kunning úr Føroyum málrættað 1. ættarliðs-føroyingum í Danmark upplivist sum eingin ella tilvildarlig – her er góður møguleiki fyri at gera afturflyting viðkomandi við at økja og samskipa kunningina

Av orðaskifti í føroyskum fjølmiðlum og á almennum pallum skilst ofta, at virðispolitiskar broytingar eru avgerandi fyri, at fáa fleiri føroyingar at flyta aftur

Nógv verður gjørt burtur úr, at Føroyar eru eitt konservativt samfelag, eitt mannfólkaveldi og at t.d. minnilutabólkar eru fyri mismuni

Henda kanning gevur kortini eina greiða ábending um, at tað eru realpolitisk heldur enn virðispolitisk viðurskifti, ið gera munin

Serliga bøtt starvs- og búlíkindi – og partvís eitt hægri vælferðarstøði sum heild

## Ítøkilig uppskot

At gera Føroyar áhugaverdari fyri 'Tey framsøknu' merkir:

At arbeiðast má við at útvega fleiri avbjóðandi størv – helst við góðari løn, møguleikum fyri eftirútbúgving og fyri at fáa meira ábyrgd/flyta upp í tign

Og síðan gera átøk fyri at marknaðarføra hesi millum føroyingar í Danmark

(At skapa lagaligari og gjøgnumskygdari møguleikar at byggja sær hús, serliga í høvuðsstaðarøkinum)

»Tey heimkæru« taka skilliga Føroyar framum – men líkindini fyri at tey flyta av landinum yvirhøvir kann gerast minni við:

At halda fram við at betra um møguleikarnar fyri framhaldsútbúgving í Føroyum

Og at marknaðarføra hesi átøk í Føroyum

Tað skulu grundleggjandi broytingar til á vælferðarøkinum áðrenn »Tey síðbundnu« fáa betri hug at flyta aftur:

Bíligari íbúðir – eitt nú eisini leiguíbúðir og almenn húsabygging

Betri sosialar veitingar, eitt nú barna- og sjúkrapengar

»Tey grundfestu« koma ikki heim aftur.



*Suni Poulsen hevur staðið fyri triðja parti av kanningini*








**AVGREIÐSLUTÍÐIR**

**Mánadag til hósdag:**
Telefon: 09.00 - 16.00
Avgreiðsla: 10.00 - 15.00

**Fríggjadag:**
Telefon: 09.00 - 13.30
Avgreiðsla: 10.00 - 13.00

ALS
Arbeiðsloysisskipanin
Tinghúsvegur 14 • FO-100 Tórshavn
Tel 349550 • Fax 349551
als@als.fo • www.als.fo